# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ilulisat skjalið

Tann 28. mai í ár hittust umboð fyri arktisku strandalondini Danmark, Grønland, Rusland, Canada, Noreg og USA til týdningarmikla ráðstevna í Illulisat í Norðurgrønlandi. Nú er Danmark ikki nakað arktiskt strandaland, men soleiðis sum uttanríksmál eru skipað í ríkisfelagsskapinum var Danmark við fundarborðið. Grønlendski landsstýrisformaðurin og danskí uttanríkisráðharrin vóru vertir fyri ráðstevuni, og umboðini frá hinum luttakarunum vóru á høgum politiskum støði, uttanríkisráðharrar, orkumálaráðharrar og varauttanríkisráðharrar. Høvuðsendamálið við ráðstevnuni var at umrøða teir møguleikar og tær avbjóðingar, sum veðurlagsbroytingarnar bera við sær í arktisku høvunum kring Norðurpólin.

Luttakararnir á ráðstevuni samtyktu eina yvirlýsing, sum hevur fingið heitið The Ilulisat Declaration. Yvirlýsingin er sera áhugaverd, tí hon hóast víst verður til Arktiska ráðið mestsum slær fast, at hesi seks londini átaka sær ábyrgdina av umhvørvinum og ríkidøminum í og undir høvunum kring pólin. Danski uttanríkisráðharrin hevur í samband við Ilulisat skjalið boðað frá, at við hesum skjali hava partarnir lagt haldgóðar politiskar karmar fyri eini friðarligari gongd í Arktiska havinum, og at luttakaralondini vilja bera seg ábyrgdarfult at framyvir, tá um gongdina í Arktiska havinum ræður. Partarnir hava bundið seg til at loysa allar ósemjur og øll trætumál við samráðingum og soleiðis er staðfest, at einki er um leysasøgurnar um eitt stríð um Norðurpólin. Mannagongdirnar eru ásettar, og allir partar hava bundið seg til at halda hesar mannagongdir. Her er einki stríð, her verður einki stríð, sigur Per Stig Møller.

Partarnir vísa í skjalinum á vaksandi vinnuliga virksemið í arktisku høvunum og vísa á tørvin á betri eftirliti og meira samstarvi um bjarging og umhvørvisvernd. Teir hava eisini bundið seg til at samstarva nærri og meira í Arktiska ráðnum. Hetta er áhugavert, og tað kann tulkast sum eitt lyfti um meira politiskt samstarv millum "Ilulisat londini" í einum rættiliga óvirknum arktiskum ráði, sum fevnir um fleiri onnur lond enn hesi seks londini aftan fyri Ililusat skjalið. Tað kann tykjast eitt sindur løgið, at júst hesi seks londini hava tikið stigið til Ilulisat skjalið uttan um Arktiska ráðið, har eitt nú Ísland er limur og Føroyar eru limur á sama hátt sum Grønland. Ráðstevnan kann tulkast sum ein roynd hjá luttakaralondunum at tryggja sær eitt forleyp í kappingini um ráðevni í havbotninum á Norðurpólsøkjunum, hóast skjalið mest umrøður sjálvt havið, havumhvørvið og livandi tilfeingið í høvunum kring pólin. Hóast bjartskygdu orð danska uttanríkisráðharrans er seinasta orðið neyvan sagt í hesum máli.

**Sosialurin**

## Hitaprísurin má kølast



**KAJ LEO JOHANNESEN**
Sambandsflokkurin

**Oljuprísirnir eru nú so høgir, at neyðugt er við tiltøkum, sum veruliga muna. Tí fer Sambandsflokkurin í heyst at koma við uppskoti um eina orkupolitiska heildarloysn, har ein partur er, at oljuavgjaldið hjá húsarhaldum skal lækka og helst avtakast**

Í hesum mánaðinum hendi tað fyri fyrstu ferð í søguni, at prísskeltini við bensinstøðirnar vístu tveysifrað tøl. 1.000 litrar av gassolju kosta nú omanfyri 8.000 krónur. Eitt meðal húsarhald brúkar umleið 3.000 litrar av olju um árið og skal sostatt av við góðar 24.000 krónur árliga, bara fyri at halda húsini heit. Hetta er ein prísur, sum eitt vanligt føroyskt húski ikki kann liva við, og tí mugu tiltøk setast í verk.

Av hesum 24.000 krónunum, sum árliga oljunýtslan kostar einum húsarhaldi, fær landskassin 4.800 krónur í meirvirðisgjaldi og 2.400 krónur í oljuavgjaldi. Samanlagt fær landskassin 7.200 krónur í sín part, og hetta talið hækkar, hvørja ferð oljan dýrkar.

Umleið tveir triðingar av el-framleiðsluni í Føroyum verður vunnin úr olju, so har fara hækkandi oljuprísirnir eisini at hava sína ávirkan. Prísin á heimsmarknaðinum hava vit onga ávirkan á, men oljuavgjald og MVG áseta vit sjálvi.

**Oljuavgjaldið**

Áðrenn apríl 2000 var oljuavgjaldið í øvugtum lutfalli við oljuprísin, tað vil siga, at hvørja ferð oljuprísurin hækkaði, lækkaði avgjaldið. Á tann hátt fingu vit ein javnari prís. Men síðani 2000 hevur avgjaldið verið fastlæst á 80 oyrum og síðani eru oljuprísirnir hækkaðir so nógv, at við gomlu skipanini hevði oljuavgjaldið fyri langari tíð síðani verið burtur.

**Stig mugu takast nú**

Høgu oljuprísirnir eru vorðnir ein hóttan fyri føroyskar familjur, og tí er neyðugt, at stig verða tikin, fyri at bøta um støðuna. Ein møguleiki er, at oljuavgjaldið verður lækkað og helst avtikið, og ein annar møguleiki er, at skipanir verða gjørdar, sum eggja fólki til at bjálva og nýta alternativa orku.

Sambandsflokkurin fer nú at fyrireika eina orkupolitiska heildarætlan, sum eftir ætlan verður løgd fram í heyst.

Nú hitaprísirnir geva kuldaskjálvta í føroyskum heimum, er neyðugt við tiltøkum. Um tiltøkini verða mett at kosta landskassanum ov nógv, kann politisku myndugleikin hóskandi útseta ætlaðu yvirtøkurnar, fyri einar 200 mió. krónur um árið, og heldur velja at geva fíggjarliga tyngdu føroysku húsarhaldunum ein lætta.

## Spurningur til Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismann, um tilbúgvingina



**RÓSA SAMUELSEN**
løgtingslimur

Í februar 2007 var ein sera áhugaverd ráðstevna um tilbúgving hildin á Hotel Føroyum, har greitt var frá, hvussu tilbúgvingin í grannalondunum var fyriskipað og hvussu tilbúgvingin í Føroyum virkar.

Endamálið við ráðstevnuni var at varpa ljós á evni, sum verða mett at hava størst týdning í strembanini eftir at skipa eina almenna føroyska tilbúgving á landi og sjógvi. Tað vóru 27 ymiskir aktørar við til ráðstevnuna, har fleiri fólk umboðaðu hvønn aktørin. 21 ymiskar raðfestingar vórðu gjørdar innan tilbúgving, tey trý sum fingu hægstu raðfesting vóru:

Felags tilbúgvingarleistur (sum Tilbúgvingarstovan hevur ábyrgdina av).

Plasering av Alarmsentrali og hvørjar uppgávur hann skal hava (ábyrgdina hevur Fútin).

Samskipan yvir kommunumørk (ábyrgdina hava kommunufeløgini).

At tí at eingin tilbúgvingarstjóri er settur, liggur hettar arbeiði stilt og ikki ber til at koma víðari við hesum arbeiði. Nú frættist eisini, at Landsverk er farið í holt við at gera sín egna leist fyri tunlar o.s.fr.

Einki er at ivast í, at tað hevur stóran týdning at fáa samskipanina av tilbúgvingini framda, og tí setti undirritaða, í farna mánaði, Tórbirni Jacobsen ein munnligan fyrispurning í løgtinginum um hesi viðurskifti, men av tí at landsstýrismaðurin var burturstaddur, tá fyrispurninguirn skuldi svarast, og tíðarfreistin fyri at seta munnligar fyrispurningar í hesi tingsetuni er farin, loyvi eg mær at spyrja landsstýrismannin spurningarnar ígjøgnum fjølmiðlarnar:

Nær kann roknast við at ein nýggjur tilbúgvingarstjóri verður settur?

Fer landsstýrið at tryggja sær, at ein komandi tilbúgvingarstjóri tekur uppaftur tað arbeiðið sum fráfarni tilbúgvingarstjóri setti í gongd við at samskipa alla tilbúgvingina?

## Áheitan

**PALLI DALSGAARD**



Áheitan til Torbjørn Jacobsen, landsstýrismann, nú tú umhugsar at fara til Danmarkar, at biðja um fíggjarliga hjálp, til at verja okkara fiskimark. Vælsignaður fá okkum blokkin aftur á rættkjøl og prístalsreguleraðan. Ikki at siga tær, vit hava brúk fyri ikki so lítið av pengum í hesum niðurgangstíðum, og serliga nú grundstykkir skulu fáast til vega bæði í New York og Moskva, tí tey kosta pengar. Eru tey dýr í Havn, tey eru ikki bíligari úti í stóru verð.

Vit eru fleiri, ið ynskja tær góða ferð.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.